
Skjótt verður akademiska flogvitið Esmar Eysturoy giftur maður

MYND: MIRIAM OG JANUS PHOTOGRAPHY

# MAMMA ER BETUR ENN GUÐRUN

HÓAST ESMAR EYSTUROY ER RAKTUR AV KÆRLEIKSPÍLUM, HELDUR HANN, AT MAMMA HANSARA ER BETUR ENN KOMANDI KONAN


PIPAR & SALT
Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo

Tað má vera ársins celebrity brúdleyp í Føroyum í ár. Akademiska flogvitið Esmar Eysturoy skal á páskum giftast við unnustuni Guðrun, og tað skal gerast í fullsettari ítróttarhøll á Hálsi í Havn.

Men hóast Esmar Eysturoy viðurkennir, at tað kriplar eitt sindur í búkinum, nú hann skal giftast við langtíðar unnustu sínari, so er eingin sum mamman.

- Eg vil siga, at mamma á mangan hátt er betur enn Guðrun. Til dømis tá vit eta fisk. Tá koyrir mamma skalið av fiskinum fyri meg, og hon veit, at mær dámar betur halan enn bringuna. Men tá Guðrun ger fisk, so fái eg bara alt, sigur Esmar Eysturoy.

- Men kanska Guðrun kann læra tað við tíðini, sigur hann.

### Hugnar sær ófært

Esmar Eysturoy hevur veruliga notið seinastu dagarnar, áðrenn hann av álvara verður knýttur saman við Guðrun. Hann sigur seg hava hugnað sær saman við nógvum konufólki seinastu vikurnar, og bara hesa seinastu vikuna hevur hann verið í hóslag við fimm damur.

- Tað er spurningurin, um brúdleypið ikki skuldi verið útsett ein mánað, so eg kundi hugna mær eitt sindur afturat, sigur Esmar Eysturoy.

Men Guðrun veit, at Esmar er ein reypari, og hon tekur hann ikki altíð fyri fult.

- Eg stóli upp á Esmar, og eg veit, at alt passar ikki, sum hann sigur.

Brúdleypið hjá Esmari og Guðrun verður á stóra showinum hjá Pipari & Salt, sum verður hildið í Havn annað páskakvøld.

## INNIHALD

4 REPORTASJA: NIELS OG SALLYVER GIFTUST TVÆR FERÐIR
8 TIPS: BRÚÐARKØKAN OG BUKETTIN
8 90 SEKUND: VANJA JUSTINUSSEN
12 REPORTASJA: FÝRA BRÚDLEYPSFOTOGRAFAR VÍSA BESTU MYNDIRNAR
16 SAMRØÐA: JÓAN PAULI JOENSEN UM BRÚDLEYPSSIÐIR
18 TIL ARBEIÐIS: HILDUR ARGE
19 UMAFTURAFTURUM: HØGNI DJURHUUS
20 TIPS: 11 BRÚDLEYPSFILMAR
21 TIPS: BRÚÐARGÁVAN TIL YMISKAR PENGAPUNGAR
22 GREINARØÐ: KALDA KRÍGGIÐ
24 SAMRØÐA: HEININA OG SIGURD GAARD HANSEN HAVA VERIÐ GIFT Í 60 ÁR
18 SPYRST SO LIVST: RIGMOR SVARAR
19 MÍN BESTA UPPSKRIFT: CUPCAKES
23 TAÐ HENDUR: KONSERTIR, BØKUR, SENDINGAR OSFR
24 VIKUMYNDIN: BESTA MYNDIN Í VIKUNI

## KLUMMAN


Inna Törnroos

# Veitslan har alt kann henda

Vit eru í romantiskum hýri í Vikuskiftinum hesa vikuna. Vit hava sett sjóneykuna á brúðleyp og tosað við tey, sum eru nýgift, tey, sum fyrireika brúðleypið, tey, sum hava verið gift eitt heilt lív og tey, sum vita hvørjir siðir eru føroyskir brúðleypssiðir.

Tað eru tólv og eitt hálvt ár síðani, eg stóð har frammi við altarið í Sørvágs kirkju!

Eg var 25, og hann var 27!

Vit vóru nýútbúgvin, fátøk og forelskað!

Veitslan var á Hotel Vágum fyri 100 inbodnum gestum. Familja og vinir úr Føroyum, Svøríki, Álandi og Finnlandi.

Eg var - um eg skal siga tað sjálv - ein hampuliga vøkur brúður. Heilt erligt hava tit nakrantíð sæð eina ljóta brúður? Ikki eg! Hvíti kjólin fær tað besta fram í teimum flestu!

Eg var sjálvandi nervøs, men eg elskaði at standa brúður.

Síðani tá havi eg verið í nóóógvum brúdleypum. Vit vóru millum tey fyrstu av vinunum at giftast, og nógv eru løgst aftrat - og nøkur longu skild eisini...

Serliga minnist eg ...

...Brúdleypið hjá svágrinum, ið varð hildið á ársins heitasta dagi á Álandi, og brúdleypsgestirnir, ið mest mintu um reyðar hummarar av hita.

...Brúdleypið hjá systrini, har flogfarið skuldi náast, og bilførarin hevði gloymt okkum og brúðarparið eftir í veitsluhølinum og koyrt til flogvøllin.

...Brúdleypini í Miðvági - sama kvøld - 100 metur ímillum, og eg og maðurin ótu tríggjar rættir x2 - hoyrdu talur x2 - ótu kakur x2.

...Brúdleypið, har parið hevði drukkið í so nógv vín, og brúðarvalsurin gjørdist í so ónærisligur frammanfyri ommum, abbum og gestum.

...Brúdleypið, har sviger av misgávum segði, at hann hevði verið forelskaður í brúðrini.

Og so framvegis ...

Tað er fantastiskt at giftast - og tað er fantastiskt at verða boðin í brúdleyp.

Góða eydnu til tykkum øll, sum eru á veg inn í hjúnarlag í summar.



VIKUSKIFTI
Redaktørar: Inna Törnroos og Eyðun Klakstein
Útgevari: Sosialurin, www.sosialurin.fo
Umbróting: Sosialurin · Høvuðssniðgevi: Pætur Eyðunsson Jensen
Forsíðumynd: Brúðarmynd / Miriam og Janus